SKJAL A

Tann 20. mai 2020

**Løgtingsmál nr. 122/2019**

**Viðmerkingar frá Amnesty International Føroyar til Rættarnevndina**

Í samband við viðgerðina av rættargangslógini valdi Amnesty International Føroyar m.a. at varpa ljós á, at umstøðurnar í varðhaldinum í Mjørkadali føra við sær, at vit hava fleiri avbyrgingar í Føroyum enn neyðugt. Og vit gleðast tí um, at evnið nú er tikið upp politiskt, og tvær virðiligar løgtingsviðgerðir seinasta mánaðin hava víst, at løgtingsfólk veruliga meina, at tað er ein ítøkiligur trupulleiki, at tølini fyri avbyrging eru so høg, og at tað er óvirðiligt, at umstøðurnar í varðhaldinum ikki eru nøktandi. Vónandi eru løgtingsfólk eisini samd um, at tað er ein stórur trupulleiki, at vit mugu senda fangar av landinum til Danmarkar at sita dóm.

**Amnesty stuðlar ásetingunum í uppskotinum, men vit hava tó nakrar viðmerkingar, sum eru settar í nummarrøð niðanfyri.**

**Løgtingsmál nr. 122/2019: "Landsstýrið skal kanna og taka tikið stig til,**

1) At umstøður í arrestini verða nøktandi og á sama stigi, sum í danska fongsulverkinum annars.
2) At tryggja teimum, sum sita dóm í Føroyum, sama tilboð og viðurskifti, sum eru til tey, sum sita fongsulsdóm í Danmark.
3) At skipa eina tilgongd, so til ber at bjóða eitt útslúsingartilboð í samband við leyslating.
4) At umrøða spurningin um at byggja nýggja arrest í Føroyum.
5) At leggja neyðug lógaruppskot fram í hesum sambandi."

**Viðmerkingar til nr. 1 og 2:**
Uppskotið leggur í sínum orðingum upp til, at tað eru betur umstøður í Danmark enn í Føroyum. Amnesty vil tó nýta høvið at minna á, at Danmark er ikki ein fyrimynd á øllum økjum. Amnesty hevur ta fatan, at á mangar hættir er tað nógv harðari at sita dóm í Danmark enn í Føroyum.
Vit senda okkara sárbærastu borgarar (ofta ung fólk) av landinum at sita dóm, hóast hetta er ein nógv harðari revsing.
Amnesty meinar tí, at hetta uppskotið eigur at taka hesar sárbæru borgarar við. Altso at seta okkum sum mál at tryggja nøktandi umstøður í Føroyum, soleiðis at vit kunnu bjóða hesum at sita dóm í Føroyum.

**Eitt sindur meira um Danmark**
Hóast kanning frá Danmark frá 2013 vísir, at heili 91% av teimum, sum enda í donskum fongslum, hava sálarligar avbjóðingar, áðrenn tey koma í samband við skipanina, so hevur rákið seinastu árini í Danmark verið, at tey innsettu skulu møtast við harðari hond.

- Søren Pape hevur úttalað seg soleiðis (Løgmálaráðharri frá 2016 til 2019):
  *"Det skal være hårdt at sidde i fængsel, det skal ikke føles godt"*. (2017)
  *"De er ikke klienter. De er fanger. De er indsatte."* (2017)

- Talið av diciplinærari revsing (fleiri enn 14 dagar í avbyrging, 22 av 24 tímum) er hækkað frá 7 (2015) til 700 (2019). Atlso nærum 10.000% uppá 4 ár.

- Folketinget ombudsmand (5. mai 2020): *"Kriminalforsorgen bør gøre mere for at sikre retssikkerheden for indsatte i strafcelle"* (https://www.ombudsmanden.dk/find/nyheder/alle/temarapport_2019_om_strafceller/).

- ST viðmælti í nýggjastu leiðreglum frá 2015: *"Mandela Rules"*, at øll lond skulu forbjóða avbyrgingum longri enn 15 dagar.
  - Svøríki: Avskaffaði avbyrging longri enn 24 tímar í 1975
  - Noreg: Avskaffaði avbyrging longri enn 24 tímar í 2001
  - Finland: Hægsta mark fyri avbyrging er 10 døgn.

- Vit vita, at júst í hesi løtu situr onkur føroyingur í líknandi støðu.

- Tað ávirkar ógvusliga flestu menniskju (longu innar fáar dagar er vandi fyri álvarsomum langtíðarárinum).
- Onnur sita í opnum fongslum, har umhvørvið er ómetaliga hart millum fangarnar, og har er heilt nógv rúsevni og harðskapur er.

- Tá vit senda føroyskar fangar av landinum, so krevur hetta, at vit eisini vitja hesi støð, soleiðis at vit eisini hava vitan um umstøðurnar har. Tí veruleikin er, at hesi fólkini sita uttanfyri sítt heimland, og hava nógv verri atgongd til vitjan, frígang og liva undir nógv harðari umstøðum.

- Umboð fyri fangavørðar í Danmark hevur úttalað seg soleiðis: *"Vit hyggja meira í buksirnar á fangunum, enn í eyguni á teimum". Sostatt er stórur vandi fyri, at relatiónsarbeiðið millum fangavørðar og fangar verður niðurbrotið.*

- Í Danmark er trot á fangavørðum (sjúkrameldingar í hópatali og færri søkja).

- Hetta eru ikki tekin um, at harða hondin førir til betri umstøður í fongslunum - hvørki fyri fangarnar ella fólkini, sum arbeiða har.

**Føroyar: Ein heilt annar veruleiki**

- Í Føroyum er støðan ein onnur. Vit hava starvsfólk, ið fáa rós frá innsettum og frá fólkum, sum samstarva við tey. Hetta eru sostatt fólk, sum vit kunnu vera stolt av, og sum vit tí eiga at taka hond um og tryggja, at tey framhaldandi vilja gera eitt so gott og týdningarmikið arbeiði fyri okkara sárbæru borgarar.
- Tað er okkara fatan, at relatiónsarbeiðið millum kriminalforsorgina, fangavørðar og fangar eru menniskjasligt og fleksibult. Og hetta ger tað møguligt at tryggja eina sárbæra yvirgongd millum at sita inni, útgang, royndarleyslating og leyslating.
- Hetta er tó ikki møguligt í sama mun, tá fangar siga dóm í Danmark, og tí eru hesi eisini í eini verri støðu, tá tað snýr seg um útslúsing.

**Vit mugu altso vera ansin við at brúka Danmark sum fyrimynd:**

- Vit mugu tí vera ansin, tá vit siga, at vit skulu tryggja somu viðurskifti, sum í donskum fongslum, soleiðis sum orðingin ljóðar í hesum uppskotið.
- Hetta hevur eisini týdning at hava í huga, tá lógin um at sita dóm (Straffuldbyrdelsesloven) skal dagførast seinni í heyst (Løgmaður segði í svari til Sirið Stenberg tann 1. mai, at lógin um at siga dóm skal dagførast og leggjast fyri tingið í heyst.)

**Viðmerkingar til nr. 3**

Tað er grundleggjandi neyðugt, at vit tryggja nøktandi útslúsingartilboð í samband við leyslating.
Her eiga vit eisini at hava í huga, at útslúsingartilboðini til fangar, sum sita í Føroyum, eru munandi lættari at skipa og fremja t.d. í stigum (Megna títt lív og Blái Krossur vita meira um hetta). Hetta er nógv verri í samband við teir fangar, sum sita dóm í Danmark, hóast hesi kunnu hugsast at hava serliga stóran tørv á eini útslúsing í stigum, har føroyska kriminalforsorgin kann fylgja viðkomandi og tryggja, at viðkomandi fær nøktandi hjálp til at gerast virkin í samfelagnum.

**Viðmerkingar til nr. 4**

Endamálið við arbeiðnum hjá Kriminalforsorgini er, at tann dømdi skal sita sín dóm, samstundis sum viðkomandi mennist til eina framtíð uttan lógarbrot. Tískil skal eitt fongsul byggjast við tí endamálið, at tey innsettu hava umstøður til at resosialisera og mennast til at taka virknan lut í samfelagnum. Hesin tørvur er átrokandi í Føroyum í dag, tí staðsetingin og umstøðurnar í Mjørkadali stríða grundleggjandi ímóti so at siga øllum tørvur fyri resosialisering.
Vit hava tørv á einum nýggjum fongslið/varðhaldi, har staðseting og bygningur tryggjar grundleggjandi krøv til resosialiering. Og har eitt varðhald og eitt fongsul virka óheft av hvørjum ørðum, tí tað er m.a. hetta sum skal tryggja, at vit fáa talið av avbyrgingum niður.

**Viðmerking til nr. 5**

Tað er ein sannroynd, at føroysku myndugleikar ofta mugu trýsta danskar myndugleikar at seta átøk í verk, og tí heitir Amnesty hervið á Føroya Løgting um at leggja eitt felags trýst fyri at fáa nøktandi fongsulsviðurskifti á skrá beinanvegin.

- Løgmaður hevur sagt, at fongsulsviðurskiftini skulu takast upp á fundi millum Løgmann og ríkismyndugleikarnar, men tann 9. mars skrivar løgmálaráðharrin í svari *"Justitsministeriets bidrag til brug for lagmandens mundtlige besvarelse af lagtingsspørøgsmål"* til Føroyar Landstýri, at tað í løtuni ikki er nøkur ætlan um at bøta um viðurskiftini í Mjørkadali.
- Amnesty vónar, at hetta uppskotið kann vera ein av fleiri hættum at leggja felags trýst á ríkismyndugleikarnar um at byrja arbeiðið við einum nýggjum fongsli í Føroyum.
- Ríkismyndugleikarnir vísa í sama svari frá 9. mars á, at høgu tølini fyri avbyrging í føroyska varðhaldinum eru álvarsom og okkurt eigur at gerast. Tey vísa á, at dagføringin av rættargangslógini fer at hava eina ávirkan. Hetta metir Amnesty tó ikki vera nøktandi, tí føroysku myndugleikarnir hava seinastu árini fylgt donsku lógini, og tí fer hetta neyvan at broyta nakað.
- Løgmálaráðharrin vísir í sama svari frá 9. mars á, at samband er tikið til Ríkisadvokatin og Kriminalforsorgina um at kanna, hvørji ítøkilig átøk kunnu gerast at fáa tølini fyri avbyrgingum niður. Amnesty meinar, at tørvur er á, at ríkismyndugleikarnir gerast varugir við, at loysnin krevur eitt fongsul og eitt varðhald, sum kunnu virkað óheft av hvørjum øðrum.
- Amnesty meinar eisini, at tørvur er á at fáa atkomulig almenn hagtøl. Eitt slíkt alment eftirlit kann seta gongd á eina hugburðsbroyting og fáa tølini niður. Vit vóna, at Ríkisadvokaturin fer at tryggja hetta frameftir.

Vegna Amnesty International Føroyar

AMNESTY INTERNATIONAL